# Sleppa at flyta inn í næstu viku



*Eldrasambýlið í Hvalba verður opið fyri almenninginum seinnapartin fríggjadagin og í næstu viku sleppa búfólkini at flyta inn*

**Eldrasambýlið í Hvalba er nú liðugt og tey, sum skulu búgva har, sleppa at flyta inn í næstu viku**

ELDRARØKT
*Áki Bertholdsen*

Nú er eldrasambýlið í Hvalba loksins liðugt og í næstu viku sleppa búfólkini at flyta inn.

Tað eru nakað síðani, at Hvalbiar Kommuna keypti eini sethús í Hvalba at gera til eldrasambýli. Men tað tók væl longri tíð enn upprunaliga mett og tað er er nú næstan eitt ár síðani, at húsið eftir ætlan skuldi verið liðugt. Eitt nú hevur tað tikið sína tíð at fáa øll neyðu loyvi til vega, tekningar góðkendar o.s.fr. sigur Levi Niclasen, bygdaráðsformaður.

Nú er tað kortini liðugt og í næstu viku flyta búfólkini inn.

Jeanna í Lágabø, sum er leiðari fyri heimarøktini í Suðuroy, sigur, at tað er pláss fyri átta búfólkum í nýggja eldrasambýlinum í Suðuroynni. Harafturat er eitt pláss til umlætting.

Níggju fólk søktu um at sleppa inn. Tey, sum flyta inn, eru øll úr Hvalbiar Kommunu. Tað er ein upptøkunevnd, sum hevur gjørt av, hvør sleppur á heimið á búgva.

Tað verður í mesta mun fólk, sum frammanundan arbeiða í heimarøktini, sum fara at arbeiða á nýggja eldrasambýlinum, tvs. heimahjálparar og heimasjúkrasystrar.

Hon sigur eisini, at hon er væl nøgd við eldrasambýli og at húsið kann væl brúkast til endamálið, nú tað er umbygt, hóast tað upprunaliga varð bygt sum vanlig sethús.

Í sambandi við, at eldrasambýli nú er liðugt, verður tað opið fyri almenninginum seinnapartin fríggjadagin ímillum klokkan trý og seks. Tá kann hvør sum vil, sleppa at síggja húsið og fáa ein drekkamunn.

### Ein munandi bati

Jeanna í Lágabø sigur, at enn er tørvurin á røktarplássum til eldri í Suðuroynni ikki nøktaður. Á Ellis- og Røktarheiminum á Tvøroyri eru 28 pláss. Men hetta seinasta árið er eisini eldrasambýli í Vági tikið í nýtslu til 11 búfólk og eitt umlættingarpláss, og nú kemur so heimið í Hvalba afturat.

– Sostatt hava vit fingið 19 pláss búpláss og tvey umlættingarpláss afturat hetta seinasta árið og tað er ein ógvuliga stórur bati, sigur hon.

Hon leggur kortini afturat, at enn eru tað nógv røktarkrevjandi fólk í Suðuroynni, sum ikki sleppa á nakað heim.

Annars heldur hon, at tað er neyðugt, at taka allan íbúðarspurningin til eldri í Suðuroynni upp til nýggja viðgerð. Hon heldur nevniliga, at tað nú er rættast at leggja á annan bógv og at hugsa meiri um at gera eldrasambýli, ella -íbúðir til eldri, sum klára seg sjálvi, og so at brúka tey plássini, sum eru, til tey, sum krevja røkt.

# Endaliga svarið var eisini nei

**– Føroya Skipara- og Navigatørfelag heldur framvegis ikki, at ósemjan um Brimil er búgvin til at semingsmaður kemur uppí.**

SÁTTÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

Tað er nú endaliga greitt, at semingsmaður kemur ikki upp í samráðingarnr um lønina hjá teimum, sum skulu sigla við nýggja vaktar- og bjargingarskipinum, Brimli.

Skipara- og navigatørfelagið hevur nevniliga nú givið Fíggjarmálastýrinum endaligt svar um tann spurningin.

Og svarið var nei.

Í farnu viku ásannaði Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, at við samráðingum ber tað ikki til at koma longri í ósemjuni um lønina hjá yvirmonnunum, sum skulu sigla við Brimli. Eitt nú vildi yvirmannafeløgini ikki góðtaka, at semingsmaður kom upp í málið.

Tí gjørdi fíggjarmálaráðharrin av, at hann kallar ikki yvirmannafeløgini til fleiri samráðingarfundir.

Ístaðin er ætlanin at leggja málið fyri Løgtingið at taka støðu til.

Men áðrenn hann gjørdi tað, spurdi hann manningarfeløgini einaferð enn, um tey kundu góðtaka, at semingsmaður kom uppí samráðingarnar og royndi at finna eina loysn.

Samstundis gjørdi hann greitt, at vildu tey ikki tað, verður málið lagt fyri løgtingið.

Og tað er nú greitt, at semingsmaður kemur ikki uppí samráðingarnar. Skipara- og Navigatørfelagið hevur nevniliga beinanvegin svarað aftur, at tað vil ikki góðtkaka, at semingsmaður kemur upp í samráðingarnar

Felagið sigur, at málið snýr seg um, er ikki at bólka nýggja vaktar- og bjargingarskipið Brimil. Tað snýr seg um at gera ein nýggjan sáttmála fyri nýggja vaktar- og bjargingarskipið Brimil.

– Tann spurningurin varð væl og virðiliga viðgjørdur fyrst í samráðingunum. Tá varð eisini fingið til vega eitt løgfrøðislig meting av tí, sigur Skipara- og Navigatørfelagið.

Áður hevur formaður felagsins, Ellintur Abrahamsen, sagt fyri Sosialinum, at løgfrøðingurin gevur felagnum rætt í tí sjónarmiðnum.

Skipara- og Navigatørfelagið heldur eisini, at samráðingarnar eru á einum sovornum støði, at málið er als ikki búgvið til at fáa semingsmann upp í.

Eitt nú er tað ikki greitt, um skiparar og stýrimenn í framtíðini skulu vera tænastumenn, ella vera starvssettir eftir sjómanslógini. Felagið sigur, at báðir hesir møguleikarnir standa opnir - undir ávísum treytum.

Felagið hevur áður boðað Fíggjarmálastýrinum frá, hvørjar hesar treytir eru, men stýrið hevur ikki svarað.

At enda sigur Skipara- og Navigatørfelagið, at tað vil heldur ikki góðtaka, at semingsmaður kemur upp í samráðingarnar so leingi samráðingarnar við hini feløgini, heldur ikki eru komnar á eitt støði, har tær eru búnar til at fáa semingsmann upp í.

Annars sigur felagið, at tekniskt er málið so einfalt, at eingin orsøk er at fáa semingsmann uppí samráðingarnar.




*Skipara- og Navigatørfelagið hevur nú endaliga boðað frá, at tað vil ikki havasemingsmenn uppí ósemjuna um Brimil. Tí verður málið nú lagt fyri Løgtingið*



Tiltikna sangkappingin aftur á skránni:

# Besti sangarin skal finnast

**Stórur áhugi er fyri kappingini Ársins songrødd, sum byrjar um góðar tríggjar vikur. Fyrireikararnir ætla at gera meira burtur úr kappingini hesaferð**

SONGRØDD
*y un akst in*

Tilmeldingarnar til sangkappingina Ársins songrødd streyma inn, nú fyrireikararnir hava lýst við, at kappingin byrjar um góðar tríggjar vikur.

– Áhugin fyri kappingini er sera stórur, og longu nú byrjar tað at fyllast í onkrum innleiðandi umfari. Vit kunnu í mesta lagi hava 10 fólk við í hvørjari innleiðandi kapping, sigur Mark Joensen, sum er ein av fyriskiparunum av kappingini.

Tað plagdi at verða vanligt, at Ársins songrødd var hildin annaðhvørt ár, tí grundarlag var ikki fyri at hava kappingina oftari, men tað halda núverandi fyrireikararnir er broytt.

– Tað tykist sum áhugin fyri kappingini hevur verið vaksandi seinnu árini, og tað er eisini tí, at hon nú er eitt árligt tiltak, sigur Mark Joensen.



*Í fjør vann Sólva Ford Ársins songrødd. Undan henni hava fleiri kendar sangkvinnur vunnið kappingina – millum annað Eivør Pálsdóttir og Arnfríð Lützen*

### Nógvir sangir at velja í

Tað verða fimm innleiðandi kappingar kring landið. Umførini verða í Norðoyggjum, Eysturoynni, Streymoynni, Vágum og Suðuroynni.

Tveir luttakarar koma víðari frá hvørjum innleiðandi umfari, og teir 10 luttakararnir skulu so kappast í finaluni, sum verður í Havn 9. juni.

Hesaferð kunnu luttakararnir velja ímillum 53 sangir.

– Vit royna at hava so nógvar sangir sum gjørligt at velja ímillum, so framførslurnar verða eitt sindur fjølbroyttar, sigur Mark Joensen.

– Í fjør høvdu vit fleiri sangir at velja ímillum, men tá sungu átta av 10 finaluluttakarum sama sangin, so tí hava vit nógv fleiri sangir at velja ímillum hesaferð, sigur hann. Talan er um kendar popp- og rocksangir frá farna ári.

### Samstundis sum Prixið

Ársins songrødd fer fram, samstundis sum stóra tónleikakappingini Prix Føroyar verður hildin, men fyrireikararnir av songrøddkappingini halda ikki, at kappingarnar fara at fløkjast.

– Vit hava lagt okkara kappingar soleiðis, at tað er fitt av tíð ímillum at kappingarnar eru á teimum ymsu støðunum. Vit royna at lata ein mánað verða ímillum Prix Føroyar og Songrøddina, sigur Mark Joensen.

Hóast báðar kappingarnar verða í gongd samstundis, fer tað kring landið ikki at tykjast ov trongt, tí tað eru altíð fleiri vikur ímillum Prixið og songrøddkappingina.

– Harafturat verður okkara finala ikki fyrr enn fyrst í juni mánaði, meðan Prix Føroyar finalan verður í apríl mánaði. Tí skuldi borið væl til at havt báðar kappingarnar komandi mánaðirnar, sigur Mark Joensen.

Meðan Prix Føroyar er ein kapping fyri tónleikabólkar, er Ársins songrødd ein kapping, har fólk syngja aftur við upptiknum tónleiki.

### Gera meiri burturúr

Fyrireikararnir av Ársins songrødd hava fingið sær nýtt ljósanlegg, og tað skal brúkast undir kappingini.

– Vit hava nýggjar ljós- og roykeffektir, og tað skuldi givið eitt betri undirhald, enn tað hevur verið áður, sigur Mark Joensen.

Fimm dómarar fara at meta um avrikini hjá teimum luttakandi í Ársins Songrødd, og teir skulu hvørja ferð finna tveir finaluluttakarar.

– Vit fara at hava dómarar, sum hava góðar fortreytir fyri at meta um avrikini hjá teimum sum luttaka, sigur Mark Joensen.

Fyrsta innleiðandi kappingin verður í Lognbrá í Klaksvík 12. februar, og síðand heldur kappingin fram til 9. juni, tá finalan verður.

## Ársins songrødd 2001

**Innleiðandi umfør kring landið:**

| | | |
|---|---|---|
| 10. februar | Lognbrá | Klaksvík |
| 17. mars | TB-húsið | Tvøroyri |
| 31. mars | Badmintonhøllin | Tórshavn |
| 7. apríl | (Helst í Sandavági) | Vágum |
| 12. mai | Høllin á Kambsdali | Kambsdalur |

**Finalan**

| | | |
|---|---|---|
| 9. juni | Badmintonhøllin | Tórshavn |

Luttakararnir fáa 53 sangir at velja ímillum. Tveir sangarar sleppa til finaluna frá hvørjum innleiðandi umfari.

Ársins plátuvendari:

# – Nú kann eg gevast

**29 ára gamli Kári Annand Berg gjørdist ársins DJ, og nú heldur hann, at tað er hóskandi hjá honum at gevast sum plátuvendari**

ÁRSINS DJ
*y un akst in*

Ársins DJ í árinum 2001 ætlar sær at gevast sum plátuvendari seinni í ár.

– Eg havi leingi umhugsað at gevast sum plátuvendari, og eftir hendan sigurin, haldi eg, at eg kann gevast, sigur Kári Annand Berg.

Men fyrst ætlar Kári at njóta sigurin, og hann hevur longu fingið fyrstu uppgávuna í kjalarvørrinum av sigrinum í Ársins DJ kappingini.

– Eg rokni við, at tað vera onkrar spennadi uppgávur næstu tíðina, nú eg eri ársins DJ, og tað ætli eg mær at taka við, áðrenn eg gevist, sigur hann.



*– Eg havi framvegis tørv fyri at fylgja við í tónleiki og at spæla tónleik fyri fólki. Tað kann eg gera í míni útvarpssending, og tí ætli eg mær at halda fram við sendingini, hóast eg gevist sum plátuvendari á dansistøðunum, sigur Kári Annand Berg, Ársins DJ*

### Kappingin

Átta føroyskir plátuvendarar vóru við í finaluni um at gerast Ársins DJ 2001.

Innleiðandi umfør vóru kring landið í fjør, og finalan var í Badmintonhøllini í Havn leygarkvøldið. Eini 800 fólk vóru til tiltakið, sum eydnaðist sera væl.

Ætlanin var, at plátuvendararnir skuldu kappast tveir og tveir, men hetta var broytt undan kappingini, so allir teir átta fingu tvær ferðir 10 minuttir einsamallir á pallinum.

Teir 20 minuttirnar høvdu teir so til at gera vart við seg, fáa fólkið við og at spæla góðan tónleik, sum kundi sannføra dómararnar um, at teir høvdu uppiborið sigurin í kappingini.

Umframt tríggjar dómarar úr tónleikaumhvørvinum, taldu atkvøður hjá 200 útvaldum áskoðarunum sum ein dómari.

### Blandað techno

Kári Annand Berg gjørdi í finaluni nógv við at blanda løg saman.

– Eg haldi ikki, at eg var bestur við mikrofonini, men eg havi helst vunnið við at mixingini, heldur hann.

Fyrru 10 minuttirnar spældi hann rock og popp, meðan hann legði dent á techno-tónleik í seinnu 10 minuttunum.

– Tað ber betri til at mixa við techno-tónleiki, og eg fekk pláss fyri eini átta sangum í seinnu 10 minuttunum á pallinum.

– Eg haldi, at kappingin var væl eydnað, og at hon var góð og jøvn, sigur ársins DJ 2001.

### Útvarpsarbeiði

Kári Annand hevur seinastu tíðina havt sendin í Útvarpi Føroya. Í løtuni kallast hendan sendingin Estudio 2000, sum verður send hvørt mánakvøld.

– Mær dámar væl at gera útvarpssendingar, og eg fari at leggja meira orku í hetta arbeiðið, tá eg gevist sum DJ, sigur Kári.

– Men sjálvandi vóni eg eisini, at eg kann hjálpa øðrum plátuvendarum at koma fram – ikki minst DJ Ice, sum stóð seg væl í kappingini hesaferð og sum kann gera tað enn betri næsta ár.

Aðrir føroyskir plátuvendarar sum Heðin Arge og Jákup Magnussen hava fingist nógv við sendingar í Útvarpi Føroya, síðani teir góvust sum plátuvendarar. Og hetta heldur Kári er ein spennandi leið at ganga.

– Eg havi framvegis tørv fyri at fylgja við í tónleiki og at spæla tónleik fyri fólki. Tað kann eg gera í míni útvarpssending, og tí ætli eg mær at halda fram við sendingini, hóast eg gevist sum plátuvendari á dansistøðunum, sigur Kári Annand Berg.